VIÐMERKINGAR

# Tað er ábyrgdarleyst at minka blokkin

Annfinn Brekkstein



Tað hevur verið ført fram av tingmanni, at vit noyðast at fáa nýggjar blokksamráðingar. Tí eri eg púra samdur í, tí tað er púra ábyrgdarleyst at minka blokkin við hálvtfjórðahundrað milliónir. Hvat gongur tað útyvir? Vælferðasamfelagið! Sitandi samgonga hevur ikki megnað at loyst teir stóru trupulleikarnar innan heilsuverkið. Eitt nú er mangul uppá íbúðir til tey sálarsjúku, og tað er stórur tørvur á ellis-og røktarheimum til tey, ið hava tænt samfelagnum ein mansaldur.

Vit føroyingar vilja liva á jøvnum føti við hini norðanlondini, hvat viðvíkur vælferð. Ein stórur partur av ungdóminum fer til Danmarkar til hægri lestur fyri síðan at venda aftur til heimlandið eftir lokna útbúgving. Tí sum nú er hava vit eitt vælferðarsamfelag, og tað ynskja tey at koma aftur til. Tey seta somu krøv til tað føroyska samfelagið, hvat vælferðini viðvíkur, sum í øðrum skandinaviskum londum. Við at minka blokkin, seta vit vælferðina niður. Tað merkir, at vælútbúgvið fólk verður fer ikki at støðast í Føroyum.

Vit hoyra dag og dagliga at læknatrot er her á landi. Hvør er orsøkin? Alt bendir á, at tað eru arbeiðsviðurskiftini innan føroyska heilsuverkið, ið ikki eru nøktandi. Tey eru munandi betur í hinum norðurlondunum.

Skal heildarveitingin minkast og skulu vit klára okkum sjálvi uttan heildarveiting, er neyðugt at geva vinnulívinum góðar karmar at virka undir. Tað er skeiv mannagongd, sum sitandi samgonga nýtir, við at ávísir almennir stovnar fáa milliónir játtaðar av løgtingsfíggjarlógini fyri ikki at koma í gjaldføristrupulleikar. Hesin peningur verður m.a. brúktur til at kappast móti tí privata vinnulívinum, og tað kann vinnan ikki góðtaka. Tíðin er farin frá, at almennir stovnar nýta skattaborgarans pening at kappast móti tí privata vinnulívinum.

Skulu vit hava nýggjar blokksamráðingar, noyðist Javnaðarflokkurin greitt at boða frá, um hann vil varðveita blokkin, ríkisfelagsskapin og vælferðina saman við Sambandsflokkinum, ella um hann vil verða stuðulsflokkur hjá sitandi samgongu.

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, ið greitt hevur boða frá, at hann ikki vil taka undir við fullveldisætlanini hjá sitandi samgongu. Hesa greiðu støðu hevur Javnaðarflokkurin ikki. Tí má hann gera upp við seg sjálvan, um hann framhaldandi vil varðveita blokkin, og finna útav, hvønn hann vil taka nýggjar samráðingar upp saman við. Tað er bert Sambandsflokkinum, sum greitt hevur boðað frá, at hann ikki tekur undir við fullveldisætlanini. Hvat er støða Javnaðarfloksins?

Kósin hjá Javnaðarflokkinum er sett, men kumpassin melur runt.

# TK stovan skipar fyri kunningarfundum

TÍÐINDASKRIV

TK Stovan skipar javnan fyri kunningarfundum um ymisk aktuel mál. Eitt mál ið far nógva umrøðu í løtuni er KT-trygd. Í hesum sambandi skipar TK Stovan fyri kunningarfundi við heitinum KT-trygd, mánadagin 22. okt. 2001 frá kl. 13:00 til 16:30.

Vit verða dagliga álopin av nýggjum virusum, og hesi verða meira skaðilig fyri hvørja ferð. Tað eru ikki bert virus vit hoyra um. Vit hoyra eisini um teldusníkar, sum bróta seg inn á heimasíður og elva til stóran skaða. Ein onnur hóttan er, at innanhýsis mannagongdirnar í samband við KT ikki er tryggar nokk.

Á hesum kunningarfundi fara vit at viðgera, hvørji atlit virkið skal hava í samband við keyp og innlegging av KT. Hvørji átøk skulu gerast innanhýsis fyri at verja seg móti tílíkum hóttanum.

Jónsvein Joensen hevur útbúving sum cand. merc. dat, og er menningarleiðari á KT-fyritøkuni Faroesoft (fyrr VIT). Jónsvein Joensen hevur drúgvar royndir innan KT-trygd, m.a. við menning av bankaskipanum hjá IBM Corebank. Hann ferð, í fyrra innleggi sínum, at greiða frá váðanum í mun til valda KT-trygd. Eisini kemur hann inn á ymisku váðarnar í KT-lívssyklusinum, t.e. frá tí at støða skal takast til KT-keyp til tað sum keypt er, verður tikið í brúk. Hvussu er kostnaðurin av KT-trygdini í mun til nyttuvirði.

Jónsvein Joensen ferð eisini at taka upp ymisk vandamál, sum eru frammi í hesum tíðum, og sum hava nakað beinleiðis við KT-trygd at gera. Evnini verða millum onnur internet og tess vandamál, E-business, bókhald og peningaflutningur, edv í mun til manuelt, opinleiki í mun til forboð, etikk og moral.

Jóhan Martin Jacobsen, sum er serútbúgvin KT-grannskoðari (CISA) og arbeiðir hjá grannskoðaravirkinum Rasmussen & Weihe, kemur í sínum innleggi inn á KT-trygdarpolitik í ymisku KT-virkisøkjunum. Nøkur av evnunum hann nertir við eru: bygnaður, stýring av brúkarum og atgongd, menning, útvegan og viðlíkahald av KT-skipanum, rakstur, dokumentatión, fysisk trygd, tilbúgving og trygdargjøgnumgongd.

Magnus S. Petersen frá Advokatskrivstovuni kemur í sínum innleggi inn á lógfrøðilig sjónarmið í samband við KT-trygd. Hann ferð millum annað at greiða frá um e-handil, og um ein teldupostur er løgfrøðiliga bindandi.

Niels Juul Akraberg Poulsen frá Tryggingarfelagnum Føroyar greiðir frá, hvørjum ein kann tryggja seg í móti, og hvat hendir í tryggingarhøpi, um nú vanlukkan er hend.

Seinast fara tvey føroysk virki at greiða frá sínari KT-trygd og teirra royndum á økinum.

Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 400 umframt mvg, og freistin at melda er sett til fríggjadagin 19. okt.

Ynskjast fleiri upplýsingar, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Steinbjørn í Dali, virkisráðgeva á TK Stovuni, tlf. 317366, fartlf. 217366 ella teldupost sd@tk.fo

# Kirkjukonsertir

TÍÐINDASKRIV

Í vikuni fara tey fýra havnarfólkini, Laila Nielsen, Jens Smith, Árni Hansen og Jens Chr. Guttesen, sum spæla ávikavist blokkfloytu, violin, cembalo og cello, at hava fýra kirkjukonsertir við barokktónleiki.

Um Lailu er at siga, at hon er einasti føroyingur við yrkisútbúgving innan blokkfloytuspæl. Tað er fyrstu ferð at hon, síðan lokna útbúgving, spælir sum solistur á hesum ljóðføri í Føroyum.

Konsertirnar verða í Vágs kirkju í kvøld, mikudagin 17. oktober kl. 20.00, í Tvøroyrar kirkju í annaðkvøld, hóskvøldið 18. okt. kl. 20.00 og í Dómkirkjuni leygardagin 20. okt. kl. 16.00. Tað er Norðurlandahúsið og Konsertfelagið, sum skipa fyri.

Sí annars lýsing aðrastaðni í blaðnum.





VIÐMERKINGAR

# Hvat hugsar FSF fyri sær ?

Jóhannes Andreasen

Í Sosialinum fríggjadagin 12. oktober stendur grein undir yvirskriftini Grønland sleppur ikki upp í UEFA. Greinin er so mikið skelkandi lesnaður, at eg kenni meg noyddan at skriva hesar reglur.

Hví eru føroyingar - eisini undirritaði - stoltir av, at landslið okkara megnaði at fáa heili sjey stig í undankappingini,

sum júst er liðug ? Man tað ikki vera tí, at fótbóltur hevur stórt symbolvirði ?

Og hvør man vera størsta einstaka orsøkin til, at føroyskur fótbóltur hevur ment seg so ómetaliga nógv tey seinastu 10-15 árini ? Man orsøkin ikki vera tann, at Føroyar hava verið limur í UEFA hesi árini, og at vit sum limaland hava kunna tikið beinleiðis lut í teimum stóru undankappingunum til EM og HM ?

Á eykaaðalfundi í Prag í síðstu viku samtyktu limalondini í UEFA eftir uppskoti frá aðalnevndini í UEFA at broyta treytirnar fyri innliman í evropeiska fótbóltssambandið. Í framtíðini verður tað soleiðis, at bert lond, sum eru limir í ST, koma upp á tal sum nýggir limir í UEFA. Tað kennist ikki sørt rangvørgt, at bæði formaðurin og aðalskrivarin í FSF siga seg hava tikið undir við hesum broytingum á eykaaðalfundinum í UEFA. Eftir at nýggju reglurnar eru samtyktar, lúka Føroyar ikki so frægt sum tær prinsipiellu treytirnar fyri limaskapi.

Tíbetur hava Føroyar longu í nógv ár verið UEFA-limaland. Men hetta er altso tann einasta grundin til, at vit yvirhøvur sleppa at halda fram sum limur í UEFA.

Grønlendingar hava sambært somu blaðgrein virkað fyri at vinna sær limaskap í UEFA og harvið fáa beinleiðis atgongd tær stóru millumtjóða undankappingarnar. Hví í Harrans garði taka føroysku umboðini í UEFA undir við, at UEFA reglurnar verða broyttar soleiðis at Grønland nú er útihýst frá at mennast sum fótbóltstjóð á samsvarandi hátt sum Føroyar.

Fótbóltur hevur stórt symbolvirði. Tað líkist tí mest av øllum eini beistagerð, sum føroyingar í hesum føri hava gjørt mótvegis grønlendingum.

**Solidariteturin er sleptur upp á fjall.**

Føroyingar vilja eftir øllum at døma tekkjast teimum valdmiklu og stóru í Evropa heldur enn at stuðla samborgarum okkara í kaldasta parti av ríkinum í arbeiði teirra fyri at sleppa inn í hitan.

Við vón um framhaldandi menning fyri fótbóltin (men ikki bara í Føroyum).

# Kommunalar samanleggingar!

Hans Birgir Hansen

Tað var í Suðurstreymoy kommunalar samanleggjanir byrjaðu tá ið Hoyvík, Hvítanes, Kaldbak, Argir, Kollafjørður, blivu lagdar saman við Tórshvnar Kommunu!

Tað var kommunala skuldin ið skapti grundarlagið fyri kommunalar samanleggjanir og barnaansing og eldrarøkt verður løgd út til størri kommunur at umsita! Tað var kommunala skuldin ið skapti grundarlagið fyri at stovna kommunala veðhaldsgrunnin ið hjálpti kommunum í Suðuroy og Sandoy við kommunalu skuld!

Tað er órættvíst at Tvøroyrar kommuna fekk sersømdir fram um aðrar kommunur tá ið hugsað verður um tær kommunur ið hava hjálpt hesa at fóta sær aftur.

Tað er Tórshavnar kommuna ið heldur lívið í flestu av landsins kommunum við øllum teimum ið búleikast í útjaðararøkjum og arbeiði í Tórshavnar kommunu!-

Tað er gott at styrkja kommunala sjálvstýri/sjávlbjargni við at fáa kommunalu skuldirnar niður á eina skattaálíkning kring alt landið og í Havnini!

Tað eigur at vera skipað langtíðar fíggjar og íløgurætlanir út í øllum landsins kommunum í ganga yvir eitt longri áramál ið vil lækka kostnaðarstøði!

Tað eigur at vera skundað undir at fáa kommunum peningin aftur tær hava goldnan til kommunala veðhaldsgrunn at gjalda sína kommunalu skuld!

Tað at Fíggjarmálastýrið við Karsten Hansen setur kommunum eitt skattaloft fyri lántøkum er fullkomuliga burtur við, uttan at seta seg inn málið!

Tað er við kommunalu samanleggjanir at kommunur kunnu samstarva á flest økjum við barnaansing, eldrarøkt, reinhald av gøtum renovatión!

Tað skal vera komið aftur til kommunalusamanleggjanir/kommunala sjálvstýri/sjálvbjargni!

# Bókaummæli

BÓKAUMMÆLI

Forlagið Leirkerið, Gøtu, hevur nú um dagarnar givið út tríggjar bøkur við ymiskum evnum eftir ymsum rithøvundum:

1. **Skapan ella úrreiving** eftir John Ankerberg og John Weldon, ISBN-99918 -45-14-18
2. **George Müller** eftir Arthur T. Pierson, ISBN-99918-45-14-3 og
3. **Hermerki Harrans í húnar hátt** eftir Dick Perfect, ISBN-99918-45-15-1

… tríggjar bíbliutrúgvar perlur, tú ger væl í at lesa; tær eru sum sniðaðar til nútíðar menniskju við tíðartroti, tí ljóð og mynd skræða í sansirnar allar – sólarring íkring.

**ad 1.**

Fyrst nevnda bók er um: *Veruleikar aftan fyri spurningin um skapan ella evolutión av lívi.* Ása Gaasedal hevur týtt úr enskum í gott móðurmál. Tú fert at fegnast um, at annað aðalevnið í bókini, the theory of evolution, ella »menningarlæran«, hevur fingið virðiligan avloysara í orðinum **úrreivingarlæran.** Bókin sigur: »Nýggjar vísindaligar avdúkingar og harðlig skriving í greinum og bókum hevur fest í aftur orðadráttin um skapan ella úrreiving og fingið hesi kjakevni inn aftur í brennidepilin:

- Er úrreivingarástøðið vísindaligt av røttum?
- Er skapanarhugtakið einki uttan bara átrúnaður?
- Í hvønn mun hevur úrreivingarstøðið ávirkað nútíðarheimin?
- Talar próvtilfarið fyri serligari skapan ella ímóti?
- Hvørji siðalig og sosial fyribrigdi eru úrslit av úrreivingarlæruni?

Bókin svarar 18 úrvalsspurningum – eitt nú spurn. nr. 11:

**Setir úrreivingarlæran líka stór krøv til trúgv sum skapanarlæran?**
Svar: Úrreivingarlæran krevur trúgv … Soleiðis hevur nýggjara læran um úrreiving (nýdarwinisman) í ávísan mun bert skift ein átrúna (yvirnatúrliga skapan um við ein annan átrúna (materialistiska evulutión) … Sum fólkalívsfrøðingurin Loren Elseley sigur: »Eftir at hava átalað gudfrøðingin fyri álit hansara á mýtur og undurverk, hava vísindini nú sett seg í somu støðu og hava skapt sína egnu mýtu við at halda, at tað, sum eftir drúgvar royndir ikki kann prógvast at henda í dag, vissuliga hendi í forðum«.

…

Leiðandi vísindamaðurin, dr. Louis Bounoure, kanningarleiðari á the National Center of Scientific Reserch í Fraklandi, tók soleiðis til: »Úrreivingarlæran er eitt vaksnamannaævintýr. Ástøðið hevur ikki hjálpt til at fremja vísindini. Tað er nyttuleyst«

…

Heimskendi russiski lívevnafrøðingurin og skapanarviðhaldsmaðurin dr. Dmitri Kouznetsov, sum hevur trý doktaraheiti í vísindum, hevur eisini sagt hugsan sína um tær negativu avleiðingarnar av úrreivingartankanum í vísindunum og á øðrum økjum. Hann ger vart við, at í Russlandi »gerast vísindafólk vanliga skapanarviðhaldsfólk av vísindaligum atvoldum« og at »viðhaldsfólk fyri úrreiving eru sera subjektiv viðvíkjandi tí tilfarinum, tey velja at nýta sum prógv fyri ástøðum sínum«.

John Weldon hevur M.D.-prógv í gudfrøði og bíbliuverju og Ph.D. í samanberandi átrúnaði.

**ad.2**

Kom og les um mannin, ið hevði áræði til at trúgva, at Gud bæði kundi og vildi nøkta allan tørv – annaðhvørt til sín sjálvs ella tey túsundtals heimleysu, hann átók sær at syrgja fyri.

George Müller var føddur í Týsklandi í 1805; eftir óflýggjalív kom hann til trúgv og gjørdist so við og við ein bønarinnar maður, sum í øllum viðurskiftum leitaði sær hjálp frá himmalska Faðir sínum.

Lívsverk sítt avrikaði hann í Englandi, har hann seinni var viðgitin fyri barnaheim síni, tí hann leit Gud til at útvega alt, ið neyðugt var – við bøn einans. Hann náddi tey 92 sum eitt livandi vitni um trúfesti Guds og hann hevur roynst mongum fyrimyndin fræga.

Les hesa ótrúligu frásøgn um ein hin kendasta bønarinnar mann í nýggjari tíð.

Við hesari 102-síðu bók– í styttum formi á føroyskum – sum Absalon Absalonsen hevur latið í léttlisnan føroyskan málbúna, hevur hann veitt andaliga bókmentaheimi okkara virðismikið íkast.

**ad 3.**

Við nýggja landnámi jødanna – 14. mai 1948 – í huga, nú teir aftur fingu fult vald yvir egnum landi, vísir enski rithøvundurin Dick Perfect á, at hendingin er profetisk fyriboðan um, at The WORLD (er) ON RED ALERT, rímandi við føroyska bókaheitið »Hermerki Harrans í húnar hátt«, grundað á Esaias 11v12: *»Hann (Gud) skal reisa hermerki til at vísa fólkunum, at Hann savnar saman aftur sundurspjaddu menn Ísraels og Juda og sankar teir aftur úr hinum fýra hornum jarðarinnar«.*

»Hermerki Harrans í húnar hátt« er handbók, ívovin váttandi bíbliutilvísingar við tí endamáli í stuttum at vísa á, hvussu bókstavliga fyriboðaðir teir profetisku sannleikarnir eru og í øktan mun samsvara við mest sannlíku tilgongdina í heiminum í næstum.

*»Sanniliga, HARRIN Harrin ger einki, uttan Hann hevur opinberað tænarum Sínum, profetunum, loyniráð Sítt« (Amos 3,7).*

Les m.a. um: Burturrykkingina – Komandi innrás í Ísrael – Ræðandi veðurlagsbroytingar – Smástjørnur, ið bresta í jørðina – Stórar dálkingar – Øgiligar skógareldar, ið taka seg upp – Øtandi jarðskjálvtar – Hermageddonstríðið – Jesus kemur aftur í dýrd – og mangt annað.

Dick Perfect hevur seinnu árini talst millum samverkrithøvundar á blaðnum Prophetic Witness hjá Prophetic Witness Movement; annar medarbeiðari hjá blaðnum var dr. Fredr. Tatford, sáli, sum vitjaði Føroyar nøkur ár herfyri.

Fororð rithøvundans enda soleiðis: »Bíbliuprofeti eru trygg og viss. Gud signi teg ríkliga, nú tú fert undir at lesa hesa sera avbjóðandi og onkuntíð ørkymlandi gransking.«

Fyrsta útgáva kom í 1997. Týtt úr enskur hevur Páll Róland Poulsen eftir 10. útg. 2001.

Perman á øllum trimum bókunum er listarligt avrik í fýra litum; allar eru í støddini 11x18xc.0,7 cm. Síðutalið ávikavist 77, 102 og 89. Prísur í bókabúð ríður um tær 100 kr. eintakið.

aura.